

# Grundleggjandi vitan um eldsløkking

Føroyskað: Jákup Midjord og Petur Olsen

Nýtsla: Bert við loyvi

# Skeið fyri tann almenna borgaran, um hvussu berast skal at, tá ið eldur er í.

Gagnlig vitan, fyri m.a. ikki at gerast ráðaleys, men tora at gera nakað, sum skil er í, til tess at bjarga og fyribyrgja.

## Yvirlit

**GRUNDLEGGJANDI UM ELDSLØKKING** .... 3
HVÍ GRUNDLEGGJANDI VITAN UM ELDSLØKKING? .... 3
ELDSLØKKING Í RAÐFYLGJU .... 3
**BRENNITEORI** .... 4
ELD-TRÍKANTURIN .... 4
TILFAR .... 4
HITASTIG .... 4
SÚREVNI (ILT) .... 4
FLOKKINGAR AV ELDI .... 6
ELDUR KYKNAR .... 7
ELDSPJAÐING .... 8
ROYKUR .... 8
**STRÁLUHITI** .... 9
FLOGELDUR .... 9
**BJARGA – BOÐA FRÁ** .... 10
BJARGING FEVNIR UM: .... 10
FÓLK Í VANDA .... 10
BJARGA BØRNUM .... 11
BJARGA DJÓRUM .... 11
AVMARKAÐ ELDIN .... 11
SLØKKILIÐIÐ .... 11
**INNISPERRING** .... 12
FRÁBOÐAN .... 13
**FYRIBYRGING** .... 14
ROYKVARNARAR .... 14
UPPSETAN AV ROYKVARNARUM .... 14
KANNA OG ROYN ROYKVARNARAN .... 14
NEYÐÚTGONGDIR .... 14
**SLØKKING** .... 16
SLØKKING VIÐ AT KØLA .... 16
SLØKKING VIÐ AT KØVA .... 17
BRANDTEPPI .... 17
ELDUR Í FÓLKI .... 18
ELDUR Í FEITTI .... 19
**HONDSLØKKIAMBOÐ** .... 20
BRANDSLANGA, SUM VATN ALTÍÐ STENDUR TIL .... 20
VATNSLØKKJARI VIÐ TRÝSTI .... 21
PULVURSLØKKJARI .... 22
KOLSÝRUSLØKKJARI .... 23
VIÐLÍKAHALD AV HANDSLØKKJARUM .... 24
**SERA VANDAMIKIÐ** .... 25
ELDFIMUR LØGUR .... 25
GASS .... 25
EL-INNLEGGINGAR .... 26
KAFFIMASKINUR .... 26
HALOGENLAMPUR .... 26
OPIN ELDUR .... 27
LIVANDI LJÓS .... 27
SIGARETTIR .... 27
TJALDING .... 28
HAVAGRILL .... 28
EINNÝTISGRILL .... 29
ELDUR Í AKFARI .... 29
ELDUR Í VIRKISBYGNINGI .... 30
FÝRVERK .... 30
**UPPGÁVUR** .... 31
ROYN TEG SJÁLVAN .... 31
FLEIRI YMISK BRUNAVIÐURSKIFTI .... 36
ÚRSLIT .... 38

# Grundleggjandi um eldsløkking

***Hví Grundleggjandi vitan um eldsløkking?***

Á hvørjum ári koma fólk illa fyri av eldi, og stór virðir fara upp í royk.
At sløkkja er uppgávan hjá sløkkiliðinum, men tað er umráðandi, at eisini tú lærir at bera teg rætt at, tá ið tú varnast, at eldur er í.
Nógvir smáir eldar kunnu verða sløktir, um skjótt og rætt verður borið at.
Tíðin, til sløkkiliðið kemur, skal nýtast rætt, soleiðis at eldur, um gjørligt, kann sløkkjast, ella ikki fær breitt seg.




***Eldsløkking í raðfylgju***




***Bjarga***
Bjarga tær sjálvum, bjarga øðrum, ávara um eldin.

***Ring til alarmsentralin***
Alarmera antin við telefon, alarmtrýsti, ella hvussu nú skipanin er á staðnum.
Greið frá eldinum, hvar tað er, og ver til staðar at taka ímóti sløkkiliðinum, tá ið tað kemur.

***Sløkk***
Sløkk við hondsløkkjarum, so nógv, sum ráðiligt er.

***Ger nakað sjálvur***
***Forða eldinum***
Koyr hurðar og gluggar aftur. Bein møguligar trykkfløskur burtur, skrúva fyri gassið, uttan at koma tær í vanda. Bein eldfimt tilfar burtur, uttan at koma tær í vanda.

# Brenniteori

### *Eld-tríkanturin*







Ein brenning kann skiljast sum ein evnafrøðilig hending, har eitt tilfar fer í evnafrøðiligt samband við Súrevni (ilt), og gevur frá sær orku, sum kann mátast í hitastigum.
Tilfar, sum kann brenna, súrevni og hiti, skulu vera til staðar og í ávísum lutfalli, fyri at eldur kann kykna.
Somuleiðis kann eldur sløkkjast, við bert at beina burtur eina síðu av tríkantinum.

### *Tilfar*

Nærum alt tilfar kann brenna, bert hitin er nóg høgur.

### *Hitastig*

Hitin er avgerandi fyri, um okkurt tilfar kann brenna. Alt tilfar, sum kann brenna, byrjar at brenna við ein ávísan hita. Verður eitt evni hitað nóg nógv upp, so kemur tað til eitt mark, har tað „sjálvtendrar". Hetta er sokallaða hitamarkið, har eitt ávíst evni fer at loga av sær sjálvum. Tað er ójavnt, hvussu nógvur hiti skal til, fyri at ymisk evni sjálvtendra.

### *Súrevni (Ilt)*

Frumevnið, Súrevnið, sum er í tí vanligu luftini, er ein fortreyt fyri, at nakað kann brenna.
Um eldur er í einum afturlatnum rúmi, vil iltinnihaldið minka, og eldurin køvast.

**Dømi um hita og sjálvtendring.**









***Flokkingar av eldi***

Sjálvt tilfarið ella evnið er avgerandi fyri, hvussu eldurin skal flokkast. Tí verða eldar flokkaðir millum fleiri sløg, alt eftir, um tað er tilfar úr føstum evni, flótandi ella í luftformi (gassi).

Flokkingarnar eru hesar: Flokkar A, B, C, D og E eldar. Flokkurin hevur týdning fyri, hvussu ein eldur skal sløkkjast - um hann skal kølast ella køvast. Vit sum sløkkja mugu hava eitt ávíst skil á hesum, fyri at sløkkja á rættan hátt.

Tilfar úr føstum evni logar í veruleikanum við glóðum, og ein glóð kann ”ana” við ógvuliga lítlari ilttilgongd. Tí er ofta trupult at køva ein gløðibrand. Hann skal sløkkjast við køling. Hinvegin skulu eldar í luftvorðnum evnum sum gassum ella í dampum frá brennandi veskum, m.a. í olju og ”frityrugrýtu”, sløkkjast við køving.




***Flokkur A***
*Eldur í føstum eldførum tilfari, sum m.a. træ, pappír og toy*




***Flokkur B***
*Eldur í flótandi evni, sum bensini olju ella føstum tilfari, sum verður flótandi, t.d. stearin*




***Flokkur C***
*Eldur í ymsum sløgum av gassi*




***Flokkur D***
*Eldur í metalli, sum magnesium,-lættmetalspønum og dusti*




***Flokkur E***
*Eldur í el-skipan*

***Eldur kyknar***

## At menna eldibrand

Ein eldibrandur verður býttur í 3 skeið:

- Byrjunarskeiðið
- Menningarskeiðið
- Fult menti eldibrandurin

**Tíðin, frá tí at ein eldur byrjar, og til hann er fult mentur, eru ofta bert fáar minuttir.**




***Byrjanarskeiðið***

Eldurin mennist róliga á einum lítlum staði. Login røkkur ikki undir loftið, og eldmenningin er her bundin av tí tilfari, sum brennur. Eldur á hesum støði kann sløkkjast við hondsløkkjarum.

***Menningarskeiðið***

Hetta skeiðið er merkt av, at login røkkur upp undir loftið, og ein spjaðing til síðurnar tekur til og festir í annað tilfar.
Tjúkkur myrkur roykur breiðir seg og leggur seg uppi undir loftinum, og login leitar sær eisini út til síðurnar.

Hitin undir loftinum økist so hvørt og er nú so nógvur, at vandi er fyri, at eldurin spjaðir seg til onnur høli í bygninginum. Fólk hava nú trupulleikar við at vera inni í hølinum. Í hesum skeiði sløkkir sløkkiliðið.

***Fult mentur eldur***

Í hesum skeiðinum logar alt tilfar, sum kann brenna, bæði innbúgv og veggjaklæðingar, og stórur vandi er fyri, at eldurin leitar sær til aðrar partar í bygninginum. Nú kunnu fólk ikki koma sær úr hølinum á lívi. Hetta hølið er í øllum førum heilt oyðilagt, -eisini eftir at sløkkiliðið hevur sløkt eldin.

***Eldspjaðing***

Við eldspjaðing skal skiljast, spjaðing av royki, hita og eldi. Við vanliga eldspjaðing breiðir roykur og eldur seg ógvuliga skjótt uppeftir, eitt sindur seinni til síðis og væl seinni niðureftir. Av tí at eldur breiðir seg nógv skjótast uppeftir, er tað umráðandi, at hurðar eru afturlatnar, og serliga tær út til trappurúm.

***Roykur***




Roykur er ofta eins eldfimur sum bensinosi. Roykur hevur í sær evni, sum kunnu brenna, og sum eru eitrandi fyri mannakroppin. Roykur er ógjøgnumskygdur og av tí hann er heitur, leitar hann altíð uppeftir.

Skalt tú koma tær út úr einum roykfyltum høli, skalt tú gera tað undir roykinum. Undir roykinum er møguleiki fyri at anda og síggja hvønn veg tú fert. Um heilt myrkt er í hølinum, er lættast at finna út við at fara fram við einum veggi. Eitt klæði fyri munn og nøs verjir ímóti tí ringastu roykdálkingini (Partiklum), men ikki ímóti teimum eitrandi luftevnunum. Ert tú illa fyri eftir at hava verið í nógvum royki, skalt tú fáa tær læknahjálp.

Tað kann vera lívs-vandamikið at fara inn í roykfyltar og brennandi bygningar.

Tilkalla sløkkiliðið. Tað er teirra uppgáva at fara inn, tá ið eldur er í. Einans ser-útgjørd manning er før fyri trygt at fara inn í bygningar undir slíkum umstøðum.



## Stráluhiti

Stráluhiti kann festa í eldfimt tilfar, sjálvt við einum fráleika upp á 20 - 30 m. Tí má slíkt tilfar verjast við annaðhvørt at køla tað ella við at beina tað burtur.
Tað er nyttuleyst at sløkkja ein stóran eld við hondsløkkjarum og tílíkari sløkkiútgerð. Tó kann við smáum tiltøkum forðast fyri eldspjaðing. Er ein bygningur hóttur av stráluhita, mugu gardinur og leyst innbúgv annars beinast burt frá gluggum og veggjum, sum kunnu gerast heitir.

Um vindeygakarmar, sperruendar ella aðrir bygningslutir á bygninginum gerast heitir, og tað rýkur úr teimum, skulu teir kølast við at sproyta vatn á.
Hetta er sami háttur, sum sløkkiliðið brúkar fyri at forða eldspjaðing.

### *Flogeldur*

Hugtakið ”Flogeldur” – heitur eldfimur roykur ella osi - kann undir serligum umstøðum ferðast við lotinum upp til fleiri hundrað metrar, oftast til eitt stað, har tað lívir.

Her má ansast eftir, at eldur ikki festir í.



*Vindur ella rútuglas forða ikki stráluhita*

# Bjarga – boða frá

At bjarga fólki, kemur altíð í fyrstu røð, tá ið eldur er í.

***Bjarging fevnir um:***

- ***At ávara fólk í vanda.***
- ***At vekja sovandi fólk.***
- ***At bjarga børnum og fólki, sum ikki kunnu flyta seg sjálvi.***



***Fólk í vanda***

Fólk í vanda eru tey, sum kunnu brenna inni, um tey ikki sleppa burtur í tøkari tíð. Oftast er talan um fólk, sum eru beint omanfyri ella við síðuna av, har eldur er í. Sovandi fólk eru altíð í stórum vanda fyri at brenna inni.
Í svøvni, merkja tey ikki roykin og koma tí fyri at missa vitið av roykeitran.





**Skadd fólk eiga at fáa fyrstuhjálp, m.a. kunstigan andadrátt sum part av hjálpini**

**Fólk, sum ikki kunnu flyta seg sjálvi, og sum eru so tung, at tey ikki kunnu lyftast, flytur tú lættast við skøvningstaki.**

***Bjarga børnum***

Børn eru ofta í serligum vanda, tá ið eldur er í, tí tey verða bangin, tá ið tey síggja og hoyra, at eldur er í.
Óvitar kunnu finna upp á at goyma seg undir seingini, í klædnaskápinum ella aftanfyri hurðina, tí tey halda, at roykurin og eldurin hvørva, tá ið tey ikki síggja teir. Børn hava ofta trongd at goyma seg, tá ið okkurt heilt álvarsamt er áfatt.

***Bjarga djórum***

Legg til merkis, at djór eru sera bangin fyri royki og eldi og kunnu vera trupul at fáast við. Farið ongantíð sjálvi inn í ein brennandi bygning, fyri at leita eftir djórum.

Tá ið eldur er í, skalt tú sum oftast leita eftir børnum.



***Avmarka eldin***

Áðrenn sjálvt bjargingartiltakið verður byrjað, kann tað verða neyðugt, at taka stig til at avmarka sjálvan eldin. Hetta tiltakið er at forða ella seinka eld- og roykspjaðing við við nøkrum grundleggjandi og skjótum tiltøkum, sum m.a. at lata hurðar og vindeygu aftur.
Við hesum seinkar og forðar tú fyri, at tey neyðstøddu brenna inni ella verða roykeitrað.

***Sløkkiliðið***

Uppgávan hjá sløkkiliðinum er at bjarga og sløkkja eld. Fyri at kunna greiða hetta skjótt, ótarnað og mest nyttusamt, skulu allir atkomuvegir fyri akførini hjá sløkkiliðinum og manningini vera farbarir. Portur, garðar, atkomuvegir, skot, trappur, gangir o.s.fr. mugu ikki forða sløkkiliðinum. Skillig gøtumerking og húsanummur eru rættiliga tíðandi.
Sløkkiliðið kannar altíð beinan vegin, um fólk eru inni í brennandi bygninginum, eisini um tað ikki hevur fingið fráboðan um tað. Innsatsurin er tí ofta settur í verk, alt eftir um fólk eru inni, ella um tey eru komin sær út til trygt stað.

# Innisperring

Rættur atburður er ógvuliga týdningarmikil um tú ert innistongdur av eldi og royki. Í eini slíkari støðu er umráðandi, at forða eldinum at breiða seg hagar, ið fólk eru stødd.
Ein vanlig stovuhurð kann halda ímóti eldi í einar 10 min. Hesa tíðina kanst tú leingja munandi, um tú hevur vatn við hondina.



**TAÐ BRENNUR SO NÓGV Í EINUM RÚMI, AT EINGIN FÆR VERIÐ INNI HAR.**

***Eldspjaðing forðast við at lata hurðina aftur. Eisini forðar hetta fyri, at hiti og roykur fer um húsini, og at eldur av hesi orsøk kyknar upp aðrastaðni. Eisini eru betri umstøður at bjarga og koma til rýmingar.***



***Nógvir eldsbrunar mennast til stórvanlukkur, tí fólk ikki bera seg at, sum tey áttu.
Tá ið tað brennur, er ov seint at leggja eina rýmingarætlan.***

Halt hurðina váta alla tíðina. Kemur roykur inn í rúmið, so lat vindeygað upp so frísk luft kemur inn. Halt teg niður móti gólvinum fyri at sleppa undan roykinum. Tá ið sløkkiliðið kemur, skalt tú royna at gera vart við teg, og geva teg til kennar við m.a. at rópa út gjøgnum vindeygað.

Lat ongantíð hurð upp inn til eitt roykfylt høli, tí tá er vandi fyri at tú nørir eldin, og eldurin verður eins og ein spreinging.

**Lat sløkkiliðið um hatta.**

*Fráboðan*

Tú alarmerar við at ringja **1-1-2** (eitt-eitt-tvey).
Alarmeringar kunnu eisini gerast í summum bygningum við einum brandtrýsti, sum boðar frá, beinleiðis til ein vaktsentral.
Brandtrýst eru bert vanlig á størri virkjum, stovnum og á summum almennum støðum.

Við at ringja við telefon, 1-1-2, fæst beinleiðis samband við alarmsentralin á politistøðini í Tórshavn.









## Alarmering

- ***Kort og mynttelefonir kunnu ringja beinleiðis til 1-1-2 ókeypis (hvørki myntir ella kort nýtist).***
- ***Tað er umráðandi at siga hvørjari bygd/býi og staði, tú ringir frá, tí alarmsentralurin fevnir um allar kommunurnar.***
- ***Telefonnummarið er vanliga at síggja á gjaldstelefonum.***
- ***Ver í telefonini, til allir spurningar eru svaraðir.***
- ***Á stórum arbeiðsplássum kunnu vera serligar alarmskipanir.***
- ***Alarmering eftir løgreglu og sjúkrabili gerast eisini við at ringja 1-1-2.***

## Boða soleiðis frá

- ***Eldur er í!***
- ***Sig navnið á Býi/bygd og gøtunavnið ella staðanavnið.***
- ***Greið nærri frá, um fólk eru komin til skaða, hvat tað er, sum brennur o.s.fr.***
- ***Sig telefonnummarið, sum ringt verður frá, og hvør tú ert.***

## Fartelefon

Tað er tryggari at brúka sokallaða fastnettelefon í sambandi við alarmering. Fartelefonir kunnu hava vánaligt samband. Vanliga sæst á alarmsentralinum, hvørjari telefon ringt verður frá. Ringir tú við einari fartelefon, skal greiðast serliga væl frá staðnum, har ólukkan er, soleiðis at alarmsentralurin skjótt kann tilkalla rætta sløkkiliðið í rætta sløkkiøkinum.

# Fyribyrging

***Roykvarnarar***

Um roykvarnari er settur upp, kann hesin ávara í góðari tíð og kann vekja sovandi fólk. Ein roykvarnari kann vekja teg og tína familju, so tit kunnu koma burtur í tøkari tíð, um eldur er í. Uttan roykvarnarar er stórur vandi fyri, at fólk doyggja, antin av roykeitran ella av eldinum.

***Uppsetan av roykvarnarum***

Tað er av týdningi, at roykvarnarar eru rætt uppsettir.

- *Fest ein roykvarnara undir loftið á hvørjari hædd. Ein varnari stendur best mitt undir loftinum og í minsta lagi 50 cm. frá næsta veggi. Fylg uppsetingarvegleiðingini.*
- *Ein roykvarnari eigur at vera settur út fyri sovikamarshurðini. Roykvarnari skal kunna hoyrast í øllum kømurum, og eru kømurini langt frá hvørjum øðrum, eiga fleiri roykvarnarar at verða settir upp.*
- *Set ein roykvarnara upp í hvørjum enda á einum longum gangi.*
- *Set ikki ein varnara beint út fyri einari køkshurð ella baðirúmshurð – Osi frá steiking, heitum vatni o.t. kann, ótilætlað, seta varnaran í gongd.*
- *Set ongantíð ein varnara nær upp at einum ventilatiónsopi. Trekkur kann forða roykinum at seta roykvarnaran í gongd.*

**Roykvarnarar bjarga lívum!**


Uppstillingarætlanin er góðkend av Brunaumsjón landsins




***Kanna og royn roykvarnaran***

Kanna av og á, um roykvarnarar virka. Kanna teir t.d. eina ferð um mánaðin, og altíð, tá tú hevur verið burturstaddur. Trýst á test-knøttin á roykvarnaranum. Blás royk beint á hann. Tá eigur hann at fara í gongd. Eru battaríini við at vera útbrend, sigur roykvarnarin sjálvur frá við at geva stutt "Bip" ljóð frá sær. Hav altíð eitt nýtt battarí liggjandi til reiðar.
Dustsúgv varnaran av og á.

**Rýmingarleiðir**



***Neyðútgongdir***

Fyri greitt at sleppa út úr einum høli, eigur tú at kanna rýmingarumstøðurnar í einum bygningi, sum tú ikki kennir, m.a. sjúkrahús, gistingarhús, samkomuhús, keypsmiðstøðir o.s.fr. Á slíkum støðum og eisini umborð á skipum eru vanliga upphongdar rýmingarvegleiðingar.

Til at kunna seg:

- *Nýt nakrar minuttir at lesa vegleiðingarnar*
- *Kunna teg um ávaringarskipanirnar á staðnum*
- *Kunna teg eisini um hvar sløkkiútgerðin er og*
- *Hygg eftir hvar rýmingarleiðirnar eru*




Men tað er ikki nóg mikið bara at kunna seg um, hvar rýmingarhurðin er. Tað er eins umráðandi at vita, um hon er í lagi (virkar). Ein rýmingarhurð, sum er læst ella sperrað, er onki verd.

**Minst til: Lyftur mugu ikki nýtast, tá ið eldur er í.**

### *Trappan er mest týðandi rúmið í húsinum*

Um trappan verður sperrað av royki og eldi, er støðan longu hættislig.
Trappurúmið er sum ein skorsteinur, ið dregur eld og royk uppeftir. Kyknar eldur í kjallaranum, fer heitur roykur og gassevni upp gjøgnum hæddirnar. Tað fyllist við hesum roykinum, sum eisini er sera eldfimur.

### *Ansa hesum*

Verður tú var/ur við eld í kjallaranum, lat so, um tað er gjørligt, hurðina til kjallaran og trappurúmið aftur. Kemur eldur í í tínari íbúð, skalt tú lata hurðarnar aftur eftir tær, men læs ikki, sjálvt um tú fert út úr íbúðini ella húsunum. Royn at forða fyri, at eldur kann koma í gangirnar og serliga í trappurúmið, við at beina leyst tilfar, órudd o.a. sum kann brenna , burtur úr hesum viðkvæma økjum.

Til tess at forða fyri skjótari eldspjaðing og fyri at gera eitt møguligt sløkkiarbeiði so lætt sum møguligt, kanst tú seta í verk hesi fyribyrgjandi tiltøkini:

- *Lat hurðina til kjallarin verða aftur.*
- *Rudda í goymslurúmi, kjallararúmi og tílíkum støðum og bein burtur óneyðugt tilfar, sum kann brenna ella sum lætt festir í.*
- *Kjallarar og goymslurúm eiga at vera læst og væl umsitin.*
- *Hav sløkkiútgerð á støðum, sum eru sjónlig og sum eru løtt at koma fram at.*
- *Latið atkomuvegir til sløkkiliðið verða lætt tilgongiligir..*

Tey flestu av hesum tiltøkum eru við til at minka um bæði eldsbrunar og eld- og roykspjaðing.



# Sløkking

### *Sløkking við at køla*

**Hví vatn?**
Vatn er gott sløkkievni, tí virknið er so sera *kølandi*.
Hitin frá eldinum fær vatnið til at dampa, og tað er hetta, sum er tað kølandi virknið.
Vatn er tað besta at sløkkja við, um eldur er í føstum evnum, so sum træi, pappíri, toyi, plastikki, innbúgvi og tílíkum.

**Vatn má ikki nýtast til at sløkkja í el-innleggingum við.**

**Hvussu skal sløkkjast við vatni?**



** Sproyta ikki á logarnar*



** Sproyta á tað, sum brennur*
** Spreið stráluna við einum fingri*
*- tað gevur betri sløkkiúrslit*



***Eldur í innbúgvi***

*Eldur er í einari pappírskurv, sum stendur við eina gardinu. Tilfarið, sum kann brenna, verður beint burtur, við at toga gardinuna til síðis, so at eldurin ikki festir í hana, aftaná kann eldurin sløkkjast við køving ella køling.*

*Um bert ein spann av vatni er tøk - skal vatnið slettast á við hondini. Stoyt ikki alt, sum í spannuni er á eldin ísenn - tí tað mesta rakar við síðuna av.*

*Ein vatnspjaðari, til at væta plantur ella strúkitoy við, kølir væl smáar eldar. Ein sodavatn, sum verður væl rist og síðan nýtt til at sproyta á eldin við, kann eisini sløkkja ein lítlan eld, tá ið skjótt skal berast at.*

Far niður í knæ og aka so nær tí, sum brennur, sum rímiligt og ráðiligt er. Tað slepst nok so nær eldinum, tí roykur, login og heit luft fara uppeftir. Sproyta vatn á sjálvt tilfarið, sum brennur – ikki á logarnar, sum stinga uppúr. flyt vatnstráluna frá síðu til síðu, so at alt tað brennandi tilfarið verður kølt (sløkt). Ein havaslanga ella kjallaraslanga eru sera góð sløkkiamboð at hava í øllum húsarhaldum, men tær skulu vera lættar at koma til, tá ið tørvur er á tí.

***Sløkking við at køva***

**Hví køving?**

At køva ein eld er ofta tann skjótasti mátin at sløkkja smáeldar. Útgerð til hetta er sum oftast við hondina – so sum teppi, jakkar, pútur o.t. Við køving forðar tú eldinum í at fáa luft. Hann minkar og kódnar.

Tó kann vera trupult at køva glóðir. Eftir at hava køvt eld í viði, pappíri, toyi, innbúgvi og tílíkum føstum evnum, skal altíð “eftirsløkkjast” fyri at tryggja sær at eldurin ikki kyknar upp aftur..




**Brandteppi**




***Brandteppi***

Eitt brandteppi er gjørt úr tilfari, sum ikki kann brenna.

Brandteppið brúkast til:

- *Smáir eldar í løgi (olju ella heitum feitti).*
- *Til at verja fólk ímóti hita.*
- *Minni eldar í føstum tilfari, tá ið eftirsløkt verður við vatni.*
- *Minni eldar í el-tólum og motorum.*

***Eldur í fólki***

***Um vatn er við hondina:***
Um eldur kemur í klæðini, er vatn tað týdningarmesta og rættasta sløkkievnið. Fá tað brennandi fólkið niður at liggja, so logarnir ikki koma at andlitinum og holdinum annars. Sløkk eldin við vatninum. Tak leyst toy oman av tí, sum er brent, og køl við vatni, til tann brendi er komin undir læknahond.



Eldur leitar altíð uppeftir. Tí skal eitt fólk, sum eldur hevur fest í, altíð leggjast niður, so logar og roykur fara burtur frá andlitinum.

**Brandteppi**
Tá ið eitt teppi verður lagt um fólkið, skal tað leggjast tætt um hálsin. Fyri at køva eldin, skalt tú trýsta á teppið og altíð burtur frá høvdinum og niðureftir. Um tú klappar á teppið, so kann tað nøra um eldin við at luft kemur til.

**Tak teppið av aftur skjótt aftaná, at eldurin er sløktur, og byrja beinan vegin at køla við vatni.**

**Um einki vatn er at fáa**



*Legg fólkið niður, so at logar ikki koma at høvdinum*



*1) Køv eldin við einum teppi, jakka ella tílíkum. fá logarnar fyrst burtur frá andlitinum ella rulla fólkinum runt á undirlagnum.*



*2) Bein toy og teppi burtur frá tí brenda økinum, so skjótt eldurin er sløktur.*
*3) Fá fatur í vatni ella aðrari óskaðiligari vesku og køl tað brenda umráðið.*
*4) Halt áfram við kølingini, til pínan er horvin, ella tann brendi er komin undir læknahond.*

**Eldur í innbúgvi**

Sløkkist best við vatni. Um vatn ikki er tøkt, so køv eldin við einum teppi, einari pútu ella líknandi - dekka alt tað brennandi umráðið til.



Eldurin kann kykna upp aftur, um tað, sum dekkað er við, verður tikið ov skjótt av aftur. Tað er neyðugt at eftirsløkkja við vatni.

### *Eldur í feitti*

Tá ið eldur er í pannuni ella feittgrýtuni, skal øll grýtan ella pannan dekkast til, annars kann eldurin ikki køvast. Tá ið eldur er í "frityrugrýtini" legg so eitt lok á, sum dekkar alla grýtuna. Lokið kann eisini nýtast sum verja, tá ið tú nærkast eldinum. Lokið skal leggjast vatnrætt á fremsta part av grýtuni og førkast síðan inn yvir grýtuna, til lokið liggur á grýtuni og køvir eldin. Sløkk hitan undir grýtuni. Fyri at eftirkanna, um tað framvegis logar, skal lokið førkast spakuliga vatnrætt útav grýtuni, og um eldurin kyknar upp aftur, skal tað førkast inn yvir aftur.




**NÝT ONGANTÍÐ VATN TIL AT SLØKKJA ELD Í FEITTI ELLA BRENNANDI LØGI**

Vatn í brennandi frityrugrýtu, fondue, steikipannu ella vesku, sum kann brenna, merkir ógvusliga dampspreinging, sum slongir tann brennandi løgin út úr grýtuni, við vanda fyri álvarsligum fólkaskaða, og vanda fyri eldspjaðing.



**FLYT ONGANTÍÐ TA BRENNANDI PANNUNA ELLA GRÝTUNA**



# Hondsløkkiamboð

### *Brandslanga, sum vatn altíð stendur til*



Ein brandslanga, sum vatn altíð stendur til, er ein slanga, sum er gjørd uppá eina rullu, sum kann svinga út úr einum skápi. Í innara enda í skápinum er ein krani, sum hevur samband við vatnsskipanina í húsinum. Á endanum á slanguni er eisini ein krani. Tá ið slangan skal brúkast, skal tann innari kranin skrúvast frá fyrst. Tað eru slanguskáp, sum lata upp fyri vatninum av sær sjálvum, tá ið slangan verður drigin út. Slangan er vanliga 25 m long. Á slanguni er ein tútur, "strálurør", oftast við trimum innstillingum: *Frá/fyri – samlað strála – spjeidd strála.*




1. *Skrúva kranan í skápinum frá*
2. *Drag slanguna út*
3. *Far fram at eldinum, so langt gjørligt og ráðiligt er*
4. *Skrúva kranan á slanguni frá*
5. *Sproyta beint á sjálvan lutin, sum brennur*




| *Fyrimunir* | *Vansar* |
| --- | --- |
| • *Vælegnað til at sløkkja eld í føstum tilfari við, sum pappír, træ, toy o.s.fr.* | • *Vandi fyri vatnskaða.* |
| • *Stór vatnnøgd 20 - 30 litrar um minuttin.* | |
| • *Vatnstrálan kann stillast til at vera samlað ella spjadd.* | |
| • *Óavmarkað mongd av vatni.* | |

***Vatnsløkkjari við trýsti***




Ein vatn/trýstsløkkjari er ein stálfløska við 9 l av vatni, sum er undir trýsti t.e. at vatnið verður trýst út úr fløskuni. Trýstið sæst á einum trýstmálara (”manometri”).
Fyri at sproyta við vatni, skal ein splitta takast úr, og handtakið trýstast niður. Fyri at steðga vatninum, skal handtakið bert sleppast aftur.
Vatnsløkkjarin hevur eina brúkstíð upp á minni enn 1 min, so er hann tómur. Orsakað av tí stuttu brúkstíðini er umráðandi, at tú ikki byrjar at sproyta, fyrr enn tú ert so nær eldinum sum gjørligt.

***Nýtsla***

1. Slít seglið við at snara segltráðin av.
2. Toga splittuna úr.
3. Far at eldinum, -so nær sum ráðiligt er.
4. Miða eftir tí brennandi tilfarinum við slanguni.
5. Trýst handtakið niður og sproyta, til eldurin er sløktur.

**Tá sløkt verður**

*Far so nær eldinum, sum gjørligt og ráðiligt er. Sproyta á tað brennandi tilfarið, og flyt slanguna frá síðu til síðu. Gev tær far um at eftirsløkkja til eingin glóð er eftir.*




| **Fyrimunir** | **Vansar** |
| --- | --- |
| • *Góður at sløkkja gløður í føstum tilfari, so sum træ, pappír og toy.*<br>• *Góð sproytulongd.*<br>• *Lættur at brúka.* | • *Avmarkað vatnmongd* |

***Pulvursløkkjari***




Ein pulvursløkkjari er ein stálfløska við serligum pulvuri í, sum verður trýst út við luft. Pulvur-sløkkjarin fæst í ymsum støddum frá 2 kg og uppeftir. Teir flestu pulvursløkkjararnir hava handtak at lata upp og aftur.

*Pulvursløkkjarar við BC pulvuri eru ætlaðir til eldar í tilfari í flokki B og C so sum:*

- *Motoreldar*
- *Eldar í løgum (eldfimum veskum)*
- *Eldar í gassi*
- *Eldar í vanligum el-innleggingum*

Til eld í føstum tilfari, sum m.a. timbri, pappíri ella toyi, skal nýtast ein pulvursløkkjari við frámerkinum ABC, sum hevur eginleikar til eisini at sløkkja glóðir við.
Tann "flokkurin", sum sløkkjarin er best egnaður til, er merktur á fløskuni.

*Gev tær far um tað sera **stuttu brúkstíðina**. Um eldurin ikki er heilt sløktur, tá ið pulvursløkkjarin er tómur, vil hann skjótt kykna aftur til tað, hann var, áðrenn sløkkingin byrjaði.*
*Smáir eldsløkkjarar muna einki, tá ið talan er um eld í bili við heitum motori, bensini og heitari olju.*

***Nýtsluvegleiðing***

1. Slít seglið við at snara segltráðin av.
2. Toga splittuna úr.
3. Far at eldinum, -so nær sum ráðiligt er.
4. Miða eftir tí brennandi tilfarinum við slanguni.
5. Trýst handtakið niður og sproyta, til eldurin er sløktur.

Brúkstíð: 2 kg./6 til 12 sek. – 6 kg./9-14 sek. og 12 kg./20 sek.
Sproytulongd: 2 kg. mest 6 m – 6 kg. 6-8 m og 12 kg. mest 8 m.



**Undir sløkking**

***Far so nær eldinum sum gjørligt, undan vindinum. Legg eitt pulvurskýggj yvir tilfarið, sum eldur er í, við skjótum feiandi rørslum. Miða eftir nærmasta kanti á eldinum og gev tær far um uppsproyting.***

| Fyrimunir | Vansar |
|---|---|
| • *Stór og góð sløkkievni* | • *Stórt eftirfylgjandi reingerðingsarbeiði* |
| • *Vælegnaður til eld í gassi og í eldfimum løgi* | • *Oyðileggur el- og EDV-útgerð* |
| • *Lættur at brúka* | |

***Kolsýrusløkkjari***





Kolsýrusløkkjarin ($CO_2$) er fullur av ”koldioxid” (kolsýru) undir stórum trýsti. Tá ið koldioxidið verður latið út úr sløkkjaranum, verður tað fyri trýsttapi og einari ógvusligari fordamping. Tað hevur í summum førum við sær, at ein partur av koldioxidinum frystir til kolsýrukava, sum er -78$^o$ C.
Høvuðsvirknið við $CO_2$-sløkkjaranum er køving, tí koldioxidið treingir burtur luftina t.e. súrevnið (iltina). Ein kolsýrusløkkjari kann brúkast í fleiri umførum.
$CO_2$ hevur tann fyrimun, samanborið við pulvur, at tað dálkar ikki frá sær.
Tí er tað vælegnað til at sløkkja í elektriskum tólum, sum EDV-útgerð, el-talvum og vanligum el-innleggingum, Sløkkidygdin til eld í føstum tilfari er vánalig.

*Kolsýrusløkkjarar eru bestir til at sløkkja eldar í flokki B og C sum:*

- *Smáar eldar í løgum (feittgrýtum o. t.)*
- *Eldar í el-innleggingum*



***Nýtsluvegleiðing***

1. Slít seglið við at snara segltráðin av.
2. Toga splittuna úr.
3. Far at eldinum, -so nær sum ráðiligt er.
4. Miða eftir tí brennandi tilfarinum við slanguni.
1. Trýst handtakið niður og sproyta, til eldurin er sløktur.

***Ansa eftir:*** Vend ikki sløkkjaranum móti fólki – tey kunnu fáa frostskaða. Í smáum afturlatnum rúmum kan koldioxidið vera vandamikið fyri fólk, tí tað treingir súrevnið (iltina) burtur.

Brúkstíð: 2 kg / 11-12 sek – 6 kg / 16 sek.
Sproytulongd: 2 kg / 3-4 m – 6 kg / 3-4 m.

**Tá sløkt verður**

*Far so nær at eldinum, sum tað er gjørligt og ráðiligt – og undan lotinum. Boygg teg framyvir og sprœn yvir alla ta brennandi flatuna. Far tó ikki ov nær tí, sum brennur, so at eldur ella løgur ikki skal støkka upp á teg.*

| **Fyrimunir** | **Vansar** |
|---|---|
| • *Vælegnaður til eld í ravmagnsinnleggingum og minni eldum í løgi* | • *Vánaliga ávirkan á eld í føstum tilfari (gløðandi)* |
| • *Lættur at brúka* | • *Kann gera álvarsligan frostskaða, um sproytað er á fólk* |
| | • *Má ikki nýtast í trongum afturlatnum rúmum* |

***Viðlíkahald av handsløkkjarum***

Tað verða framleidd nógv ymisk sløg av handsløkkjarum, sum skulu brúkast á ymsan hátt. Kunna teg um, hvussu ein ávísur sløkkjari skal brúkast, tí tá á stendur, er eingin tíð at lesa nýtsluvegleiðingina. Kunna teg á arbeiðsplássinum og aðrastaðni, har handsløkkjarar hanga og standa – og les nýtsluvegleiðingina.
Sløkkjarar við sløkkitilfari undir trýsti (vatnsløkkjarar, pulvursløkkjarar og kolsýrusløkkjarar) skulu vera av góðkendum slagi sambært DS/EN 3 ella DS 2120 og teir skulu vera merktir, til hvørjar eldflokkingar teir eru best egnaðir til.
Sløkkjarar við vatni, skulu ikki setast har tað frystir – ella vera av frosttryggum slagi.
Allir sløkkjarar skulu eftirhyggjast árliga av brúkaranum. Merkjast skal á teir, nær teir eru eftirhugdir. Hygg eftir, um fløskan, manometur, slanga, splitta og segl eru í lagi. Trýstmálari skal serliga eftirhyggjast.
Um seglið er slitið, ella sløkkjarin hevur verið í brúki, skal hann beinanvegin sendast inn til eftirlit og áfylling á góðkendum verkstaði.
Vatn- og pulvursløkkjarar skulu latast góðkendum verkstaði 5. hvørt ár.
$CO_2$ sløkkjarar skulu latast inn til eftirlit 10. hvørt ár.



# Sera vandamikið

### *Eldfimur løgur*

Festir tú í pappír ella timbur, so logar eldurin at kalla hóvliga. Festir tú í ein svávulpinn inni í einum rúmi, har bensin er stoytt niður, er vandi fyri spreinging.

**Tað er dampurin, sum brennur!**
Eitthvørt tilfar, sum kann brenna, gevur frá sær gass ella osa. Tá dampirnir verða hitaðir nóg nógv gerast teir eldfimir. Tá pappír brennur, gevur tað í fyrstuni frá sær eitt lítið sindur av gassi. Bensin gevur harafturímóti frá sær stóra mongd av gassi longu við vanligum stovuhita. Tá ið hesin dampurin blandast við luft, og ein neisti, høgur hiti ella opin eldur kemur at teimum, festir í dampin, so ein spreinging verður.



Einans 3% av bensindampi í luftini kann geva eina blanding sum kann brenna.




Hetta er ein uppgáva hjá tær

Hetta er ein uppgáva hjá sløkkiliðinum

### *Gass*

Luft, sum verður upphitað, víðkast. Um ein trýstfløska (t.d. gassfløska) verður fyri upphiting, er vandi fyri, at hon spreingist, tí at trýstið í fløskuni verður meiri enn tangin tolir.
Tí skalt tú halda tær burtur frá **øllum** trýstfløskum (tangum) í økjum, har eldur er í. Ávara onnur um vandan og lat sløkkiliðið um at sløkkja. Tað besta er um tú kanst beina trýstfløskurnar burtur, áðrenn hitin kemur at teimum.

Um eldur stendur úr eini gassfløsku (eldur í flokki C), kann hann verða sløktur bert við at skrúva kranan fyri ella við at nýta ein pulvursløkkjara.
Eldur í krananum ella trygdarventilinum eyðkennist av, at ein logi stendur út frá teimum. Login kann vera lítil ella stórur, alt eftir hvussu lekin er. Í hesum føri skalt tú lata sløkkiliðið um at sløkkja.



*El-innleggingar*

Brek og ólag í elektrisku innleggingunum kunnu elva til skammlop og eldsbruna.
Tí hevur tað týdning, at allar elektriskar innleggingar verða gjørdar av fakfólki undir ábyrgd, og at elektrisk tól verða sløkt aftan á nýtslu.
Kemur eldur í eitt elektriskt tól, sløkk tá kontaktina fyrst og toga stikkið úr. Vatn má ikki nýtast at sløkkja við, fyrr enn streymurin er avbrotin. Er talan um størri elektriskar innleggingar, skal nýtast ein kolsýrusløkkjari.

**Góð ráð:**

- *Sløkk øll elektrisk húsarhaldstól tá ið tú ert burturstaddur/-stødd ella tá ið tú svevur.*
- *Virkar eitt elektriskt tól ikki sum tað eigur ella gerst ov heitt, eisini í stikkinum, so sløkk. Send tólið til umvælingar, áðrenn tú brúkar tað aftur.*
- *Bind ikki ov mong tól og lampur í somu stikkkontakt.*
- *Ansa eftir, at sjónvarp, køliskáp, telda o.s.fr. ikki standa so trongt, at tey ikki sleppa av við hitan.*
- *Ansa eftir, at ikki rottur og mýs koma at gnaga hol á el-innleggingarnar, -serliga í úthúsum, summarhúsum og har, sum fólk vanliga ikki eru.*



*Kaffimaskinur*

Minst til at sløkkja kaffimaskinuna eftir nýtslu. Far ongantíð frá eini kaffimaskinu, sum er tendrað. Gamlar kaffimaskinur kunnu gerast í ólagi við vanda fyri skammlopi, so at álvarsligur eldur kyknar sum avleiðing av hesum.

*Halogenlampur*

Halogenlampur krevja varsemi. Ein Halogenlampa kann blíva yvir $500^0$ C heit og kann verða ein veruligur eldsvandi. Hitin frá eini halogenlampu er so mikil, at hann kann festa eld í pappír eftir fáum sekundum. Somuleiðis kann eldur kykna í toyi eftir lítlari løtu. Tí skulu halogenlampur altíð vera settar í tryggan fráleika frá øllum eldførum tilfari.
Summar halogenlampur hava ámerking, sum vísir, hvussu langt tær skulu setast frá tilfari, sum kann brenna. Hesi mát skulu altíð haldast.



***Opin eldur***

At nýta opnan eld í gerandisdegnum kann hava brunavanda við sær, um vit ikki eru nóg ansin. At vera óvarin, bara eina lítla løtu, kann enda galið.

***Livandi ljós***

Stearinljós eru ofta atvoldin til eld. Tí er tað týdningarmikið at hava hesi fyribyrgjandi tiltøk í huga.

**Góð ráð:**

- *Far ongantíð út úr einum høli, har stearinljós brenna.*
- *Set ongantíð eitt stearinljós í nánd av tilfari, sum kann brenna so sum gardinum, tíðindabløðum o.s.fr. ella undir eitt skáp ella eina bókahill.*
- *Flyt ikki ljós, meðan tað logar.*
- *Ansa eftir fýrfatsljósum og legg ella set tey í opnan haldara, staka ella skál sum ikki kunnu brenna. Set ikki ov nógv ljós saman í ein trunka.*
- *Brúka ikki óstabilar, ótryggar ljósastakar, og tryggja tær, at ljósið situr so fast, at tað ikki koppar.*
- *Ansa eftir ljósmanchettum úr pappíri og plastikki, og sløkk ljósið áðrenn tað er brent niður, einar 4 cm til manchettuna.*
- *Ansa eftir ljósum, sum eru løgd við gulli, silvur ella kopari. Metallið, sum pyntað er við, kann vera úr tilfari, sum eldur festir í og gevur stóran loga.*

***Sigarettir***

Tað er av týdningi, at roykjarar ansa eftir sigarettini, so hon ikki festir í annað tilfar. Um tú missir sigarettina ella eina glóð, niður í eina sofu, so liggur hon har og anir í langa tíð og kann geva frá sær deyðiligan royk og kolsúrni (Kolíltu) sjálvt áðrenn eldur logar. Tað er týdningarmikið at ansa væl eftir við sigarettini, meðan tú roykir.

**Góð ráð:**

- *Royk ongantíð í songini.*
- *Alkohol og heilivágur ger teg dølskan og óansnan, so tú ikki varnast, um tú missir eina glóð.*
- *Nýt stór og djúp øskubikør.*
- *Stoyt vatn á øskuna og stubbarnar, áðrenn tú tømir øskubikarið, ella bíða við at tøma tað til dagin eftir.*






*Tjalding*

Brunatrygdin er sera týðandi á einum tjaldstaði, tí eldur í einum kampingvogni ella einum tjaldi kann breiða seg óhugnaliga skjótt.

**Góð ráð:**

- *Set tjald ella kampingvogn nóg langt frá grannanum, og við í minsta lagi 3 m sínámillum fráleika.*
- *Kunna teg um trygdarásetingarnar á tjaldstaðnum, og hvar nærmasta sløkkiútgerð stendur.*
- *Ver varin, tá ið tú kyndir opnan eld, eitt nú gasskókara. Set hann ikki ov nær tjaldinum ella kampingvogninum.*
- *Hav altíð onkra sløkkiútgerð í nánd og til reiðar, t.d. ein dunk ella spann við vatni ella ein 6 kg pulvursløkkjara.*
- *Tryggja tær, at familja og vinir kenna hesi ráð, og at tey vita, hvussu tey skulu bera seg at, um eldur kemur í.*

*Havagrill*

Eitt grillkvøld við familju og vinum er hugnaligt, men nógv gloyma tað neyðuga varsemið, tá ið tey grilla og tað hevur hvørt ár við sær, at bæði børn og vaksin fáa álvarsamar brunaskaðar.

**Góð ráð:**

- *Nýt turrspritt og tilíkar kubbar at kynda við.*
- *Stoyt ongantíð eldfimar løgir yvir eina heita grill at kynda uppaftur við, og set ongantíð t.d. eina opna sprittfløsku nær einari heitari grill.*
- *Lat ongantíð børn vera einsamøll í nánd av einari heitari grill.*
- *Hav altíð onkra sløkkiútgerð í nánd og til reiðar, t.d. eina havaslangu, eina spann við vatni ella ein 6 kg pulvursløkkjara.*
- *Ver varin , um tú ert í víðum summarklæðum og fæst við grillina.*
- *Tryggja tær, at øskan er heilt sløkt og køld, tá ið tú koyrir hana burtur. Stoyt um neyðugt vatn á hana.*



***Einnýtisgrill***

Einnýtisgrillin er um at vera heilt vanlig, men hon er eisini vandamikil. Tann bakkin, sum kolið er í, verður ógvuliga heitur og nærum ikki til at flyta. Um bakkin stendur á onkrum, sum kann brenna, er vandi fyri, at tað festir í undirlagið.
Eftir at liðugt er at grilla, ganga fleiri tímar, áðrenn øskan er køld. Tryggja teg móti eldvanda við at stoyta vatn í bakkan, áðrenn tú beinir hann burtur.

*Grillar tú úti, oman á sandi ella eyri, so lat vera at grava grillina niður í sandin ella vøllin, tá hon skal beinast burtur.*
*Grillin verður verandi heit í langa tíð, og hon hitar eisini sandin upp. Um onkur stígur á staðið, er vandi fyri, at brenna seg álvarsliga.*

***Eldur í akfari***

Tað er sjáldan, at eldur av sær sjálvum kemur í ein bilmotor, men um tað hendir, er møguligt at sløkkja eldin, um tú bert teg rætt at. Hav tí altíð ein 6 kg pulvursløkkjara liggjandi framman í bilinum. Skal farast aftur í viðførisrúmið eftir sløkkjaranum, kann tað vera ov seint.
Pulvursløkkjarin skal vera í minsta lagi 6 kg av slagnum ABC, um hann skal gera røttu nyttuna. Kemur eldur í ein bil í ferðsluóhappi, og tað festir í bensinið, kann tað gerast heilt álvarsamt, og tá ger ein lítil pulvursløkkjari onga nyttu. Í slíkum førum er tað sløkkiliðið, sum skal sløkkja eldin.
Verður tú varur við royk ella loga í motorrúminum á bilinum, skalt tú støðga við vegjaðaran og sløkkja motorin.

**Síðan eru ráðini hesi**

- *Fá øll út úr bilinum.*
- *Tak pulvursløkkjaran, slít seglið og tak splittuna úr.*
- *Lat motorhjálmin upp, men lyft ikki lúkuna upp. Á henda hátt forðar tú eldinum at fáa luft, tí annars nørist hann enn meir.*
- *Lyft lúkuna eitt lítið sindur uppfrá –til láskrókurin heldur ímóti – og spræn pulvur inn í motorrúmið.*
- *Sproyta í einum allastaðni í motorrúminum.*
- *Heldur tú at eldurin er sløktur, kann motorhjálmurin latast heilt upp. Statt við síðuna av bilinum, so at hjálmurin "skuggar" fyri, um stikklogar skuldu komið úr motorrúminum.*





### *Eldur í virkisbygningi*

Flestu virki eru viðbrekin fyri einum eldsbruna. Bæði maskinur og summar arbeiðsgongdir kunnu geva frá sær neistar og hita. Ofta eru goymslur við eldfimum tilfari.
Kaffimaskinan, sum ikki verður sløkt, upphópað órudd og eitt sindur av óansni kunnu skapa umstøður, so at eldur kann koma í.

Um eldur kyknar í einum stórum bygningi, kann hann gerast ógvusligur og hava við sær vanda fyri fólkalívi, virðismissi og missi av arbeiðsinntøkum.
Tað tekur tíð at byggja upp aftur eitt framleiðslustað, vørugoymslu, og at fáa virksemið í gongd aftur.
Í hesum tíðarskeiðinum missir ein fyritøka inntøkur, starvsfólk og viðskiftafólk, sum kunnu verða trupul at fáa aftur.
Tað hevur stóran týdning, at starvsfólkið kennir teir grundleggjandi setningarnar fyri eldsløkking og hevur kunnað seg um, hvar sløkkiútgerðin er, og hvussu hon skal brúkast.

*Eldur í eini fyritøku kann føra við sær mist arbeiðspláss.*

### *Fýrverk*

Fýrverk kann elva til stóran brunavanda og skal tí goymast á tryggum stað og nýtast við umhugsni. Fýrverk má ikki goymast, har tað annars er vandi fyri eldi, og heldur ikki í nøgdum, sum kunnu hava við sær brunavanda fyri fólk og bygningar. Fýrverk skal goymast í minsta lagi 2 m. frá støðum, ið geva hita frá sær, og í minsta lagi 5 m. frá øðrum eldfimum goymslum og hitakeldum. Til heimanýtslu er loyvt í mesta lagi 5 kg. av fýrverki. At skjóta fýrverk skal eisini gerast við skili. Rakettir kunnu gera skaða, og skulu tí skjótast við ansni, so tær ikki fara av leið.
Fýrverk má ikki skjótast frá støðum, har annað fýrverk er, og heldur ikki frá støðum, har eldfimt tilfar verður goymt.

*Hav altíð í huga tey trygdartiltøk, ið eru galdandi, tá ið fýrverk verður skotið!*



# Uppgávur

***Royn teg sjálvan***

Fyri at vita, um hesar frágreiðingarnar hava fest seg, kanst tú ”Royna teg sjálvan” við at loysa fylgjandi uppgávur.

Les hvørja uppgávu sær væl ígjøgnum, áðrenn tú svarar.

Gev tær far um, at tað kunnu vera fleiri svar til somu uppgávu.
(t.d. uppgávurnar 9 og 10).




*Tú gert nátturða. Telefonin ringir. Tú fert inn í stovuna at svara. Tá ið tú kemur aftur, logar í pannuni.*

***Hvat hevði tú gjørt?***

A: *Flutt pannuna av komfýrinum*

B: *Sløkt við at stoyta vatn á pannuna*

C: *Sløkt komfýrin og lagt eitt lok á pannuna*




*Tú situr í hvílistólinum og roykir, tá ið tað bankar uppá. Áðrenn tú fert at lata upp, leggur tú sigarettina í eitt øskubikar, sum stendur á armleninum. Tá tú kemur inn aftur í stovuna, er sigarettin dottin niður í stólin, og tað logar upp úr honum.*

***Hvørja raðfylgju hevði tú nýtt ?***

A: *Køvt eldin við einum teppi*

B: *Farið eftir vatni til at sletta á stólin*

C: *Toga stólin burtur frá gardinunum og øðrum innbúgvi*




*Tú stendur einsamøll í stovuni við bakinum móti sofaborðinum, har livandi ljós standa. Eitt ljós festir í klæðini hjá tær, og tað kemur rættiligur eldur í.*

**Hvat hevði tú gjørt fyrst?**

A: *Runnið til nærmasta vatnkrana og roynt at sløkt*

B: *Blakað teg á gólvið og fingið "trýst" eldin burtur*

C: *Roynt at farið úr teimum brennandi klæðunum*




*Jólaaftan er familjan samlað um træið. Tú ert fyrivarin og hevur sett eina spann av vatni í stovuna. Eitt av ljósunum festir í greinarnar.*

**Hvussu vilt tú sløkkja?**

A: *Kasta eitt teppi yvir træið*

B: *Stoyta eina spann av vatni yvir træið*

C: *Sletta vatn úr spannini við hondini á greinarnar*




*Tú ert heima saman við familjuni og stákast sjálvur uttanfyri við okkurt. Fyri einum hálvum tíma síðani tømdi tú øskubikarið í ruskposan undir køksborðinum. Har er eisini slangan frá gassfløskuni. Fløskan sjálv stendur aðrastaðni í húsinum. Tú leggur til merkis, at roykur kemur úr húsinum. Tá ið tú kemur inn, sært tú, at logar frá gassslanguni standa út undan køksborðinum.*

**Í hvørji raðfylgju hevði tú farið fram?**

A: *Roynt at sløkt við kjallaraslanguni*

B: *Latið ventilin aftur á gassfløskuni*

C: *Tryggjað tær, at eingi fólk eru inni í húsinum*

D: *Ringt til alarmsentralin og boðað frá eldsbruna*

6



*Tú býrt í einum eldri húsum.*
*Hálvan tíma eftir, at tú hevur ruddað í kjallaranum, leggur tú til merkis, at roykur kemur út gjøgnum hurðargloppið til kjallaran.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

A: *Latið hurðar og vindeygu í trappugongini upp fyri at fáa roykin út*

B: *Latið kjallarahurðina aftur og varskógvað hini, sum eru inni*

C: *Farið inn í roykin fyri at finna orsøkina*

D: *Ringt til alarmsentralin og møguliga gjørt hurðina váta*

*Tey yngstu børnini spæla í kjallaranum ella úthúsinum, har tveir dunkar við bensini og ein gassfløska standa. Børnini hava eina svávuldós og hava fest í nøkur bløð og nakrar klútar, og login stendur frá teimum.*
*Børnini hoyrast skríggja*

**Hvørja raðfylgju hevði tú nýtt?**

A: *Beint bensindunkarnar og gassfløskuna burtur*

B: *Sløkt við vatni*

C: *Bjargað børnunum út*

7



8



*Tú koyrir í bili og hevur eina løtu merkt bensinlukt. Knappliga sært tú royk koma úr motorrúminum. Tú steðgar við vegjaðaran, sløkkir motorin og letur motorhjálmin upp og sært, at eldur er í motorinum. Tú hevur ongan eldsløkkjara, men ein dunk av vatni og eitt teppi í bilinum.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

A: *Køvt eldin við teppinum*

B: *Latið hjálmin aftur*

C: *Sløkt við at sletta vatn á eldin*

*Tú vaknar á einum hotellkamari og luktar royk. Tú verður bangin og gloppar hurðina. Roykur og eldur stendur ímóti tær.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

*A: Roynt at komið tær út í gangin, fyri ikki at brenna inni í kamarinum*

*B: Latið hurðina aftur og ringt til móttøkuna og boðað frá eldinum*

*C: Latið vindeygað upp og rópt um hjálp*

*D: Kølt hurðina. Stoytt vatn á hurðina og hildið hana váta*




*Á einum verkstaði arbeiðir tú við at vaska ein motor. Eitt ílat við petrolium stendur við síðuna av tær. Starvsfelagin næst við fer at sveisa. Knappliga fer at loga í petroliumsílatinum. Á verkstaðnum er vatnslanga, hond-eldsløkkjari og eitt brandteppi.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

*A: Sløkt við vatnslanguni*

*B: Sløkt við pulvursløkkjaranum*

*C: Sløkt við at leggja brandteppið oman yvir ílatið*






*Á einum verkstaði arbeiðir tú við eina maskinu. Nakrir neistar støkka yvir á ein dunga av óruddi, t.d. tvistar og klútar, sum eldur festir í. 5 metrar frá tær er ein spann við vatni, eitt slanguskáp og ein 6 kg pulvursløkkjari.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

*A: Stoytt vatn á eldin*

*B: Sløkt við pulvursløkkjaranum*

*C: Sløkt við vatni frá slangurulluni*




*Tú arbeiðir á einum verkstaði. Knappliga kemur eldur í ein el-motor. Motorurin støðgar, og eldur kemur frá honum. Eldurin er soleiðis, at tú ikki sleppur til avbrótaran at sløkkja. Næst við er eitt slanguskáp, ein kolsýrusløkkjari og nakrir sekkir.*

**Hvat hevði tú gjørt?**

*A: Køvt eldin við sekkjunum*

*B: Sløkt við vatni frá slangurulluni*

*C: Sløkt við kolsýrusløkkjaranum*



***Fleiri ymisk brunaviðurskifti***

Hugsa um hvønn eldin sær, og tak síðani
avgerð um, hvussu tú vilt bera teg at.

**Eldur 1:** Ein sigarettglóð hevur fest í pappírskurvuna.

**Eldur 2:** Øll sofan og gardinurnar loga.

**Eldur 3:** Grannaognin, sum er uml. 20 m. frá tínum húsum, brennur ógvisliga.




**Hvar er ó-/tryggleikin?**

Í hesum heftinum hevur mest verið víst á at sløkkja eld, men tað ber eisini til, at fyribyrgja, at eldur kemur í, um tú ert umhugsin við eldi, el-innleggingum og el-tólum.
Á myndunum er víst ein røð av umstøðum, sum ofta elva til, at eldur kyknar.
Ert tú nú so ”eldtryggur”, at tú kanst finna tær?
Á næstu síðu kanst tú kanna eftir, um tú hevur funnið vandastøðini og tær røttu loysnirnar.



*Úrslit*

**Royn teg sjálvan:**

| | |
|---|---|
| **1.** | C |
| **2.** | C-A-B |
| **3.** | B |
| **4.** | C |
| **5.** | B-C-D-A |
| **6.** | B síðan D |
| **7.** | C-A-B |
| **8.** | A |
| **9.** | B síðan C/D |
| **10.** | B ella C |
| **11.** | C |
| **12.** | C |

## *Brunaviðurskiftini 1, 2 og 3*

**Eldur 1:**
Toga gardinurnar frá
- legg ella blaka eitt teppi yvir pappírkurvuna
- sløkk glóðir við vatni. Hevur tú vatn hjá tær so sløkk beinanvegin.

**Eldur 2:**
Um hitin er so nógvur, at tú ikki kanst koma nær at eldinum:
Lat stovuhurðina aftur
- fá fólk á ovaru hædd út
- tilkalla sløkkiliðið, ring 1-1-2
- køl útsíðuna á hurðini við vatni.

**Eldur 3:**
Vek fólk á 2. hædd
- er sløkkiliðið ikki komið, -so ring **1-1-2**
- lat øll vindeygu aftur fyri brandsmittu, eisini uppi á loftshæddini
- flyt gardinurnar og annað innbúgv, sum er í vanda fyri stráluhita
- set spannir við vatni í tey rúmini, sum venda ímóti eldinum.
- kanna eftir um húsalutir verða heitir, og um vandi verður fyri brandsmittu.

**Hvussu varin ert tú við eldi?**
1. Livandi ljós er nær gardinunum.
2. Strúkijarnið stendur beint á strúkibrettinum við leidninginum í stikkkontaktini.
3. Stikkkontaktin er ovbyrjað av tólum, sum nýta nógvan streym.
4. Bensin verður nýtt til at reinsa við, meðan livandi ljós og el-hitaovnur eru tendrað.
5. Barnið spælir við svávulpinnar.
6. Klæði verða turkað á el-hitaovninum.
7. Royking í songini (er ofta deyðsorsøk).
8. El-leidningur er festur í veggin við einum nagla.